**Ummæli**

# Okkara sangbók 2018 hevur nakað til tey flestu

*Uttan iva hava menninir handan nýggju sangbókina, Ernst S. Olsen og Signar í Homrum rakað rímiliga plett tá um sangúrvalið ræður. Hesar 267 sanginar munna tey flestu bera kenslu á, og tí er heitið, Okkara sangbók, á góðari leið.*

*Leif Hansen*

Ikki munna nógvar veitslur verða hildnar í Føroyum, uttan at felagssangur er partur av teimum. Veitslusangir er tó ikki nakað greitt avmarkað sangslag, men fevnir nærum alt, uttan sálmar og sangir við religiøsum innihaldi. Tí er úrvalið í *Okkara sangbók* rímiliga breitt og inniheldur ikki bara føroyskar sangir, men eisini útlendskar sangir, sum vanligir eru at syngja í Føroyum.

Sangir, sum skulu kunna syngjast til felagssang, skula vanliga uppfylla nøkur grundleggjandi musikalsk kriteriir. Teir skula verða sangbarir hjá einari fjøld at syngja. Somu krøv eru sjálvsagt ikki til sangir, sum upprunaliga eru hugsaðir sum solosangur við fylgispæli. Men tá nýggjir sangir av og á vinna inn í felagssangin, so koma hesir í høvuðsheitum úr poppulertónleikinum, sum altíð hava fylgispæl. Verður sæð burtur frá lejlighedsyrking, so verða fáir sangir í dag skrivaðir, við tí fyri eyga, at teir skula verða felagssangir. Næstan uttan undantak hava nýggjir sangir, sum fjøldin hevur tikið til sín og hildið verið brúkiligir sum felagssang seinastu 40-50 árini, sín uppruna í poppulertónleikinum.

**Grøna sangbókin**
Tá *Grøna sangbók* kom út fyrrapartin av 90'inum nærum kollvelti hon ímyndina av einari sangbók og kanska broytti hon føroyskan felagssang eitt sindur. Sangúrvalið varð nakað væl meira liberalt enn tað, sum føroyingar kendu úr eitt nú *Føroya Fólks*. Umframt nógv av tí kenda úr *Føroya fólks*, vóru eisini sangir, sum ongantíð høvdu verið í sangbók fyrr, og sum heldur ikki vóru so vanligir at syngja til veitslur ella har fólk komu saman. Málið var felagssangur við guitarfylgispæli. Tó at guittarin longu frá 50'inum byrjaði at verða vanligt ljóðføri kring landið, so var *Grøna sangbók* tann fyrsta, sum hevði talseting til næstan allar sanginar.

**Sangir til veitsluhald**
*Okkara sangbók*, sum kom fyri summarfrítíðina, tykist at hava eitt praktiskt stavnhald. Hon er ein sangbók til felagssang, sum innihaldsliga fevnir um sangir, sum í dag verða sungnir til veitslur og samkomur kring landið. Eyðvitað fyriliggur eingin nágreinilig kanning av, hvussu nógv og hvat vit føroyingar syngja, og tí kann *Okkara sangbók* neyvan síggjast sum ein neyv tíðarmynd av felagssangi 2018. Hinvegin er eingin grund til at ivast í, at menninir aftanfyri bókina hava fingurin á felagssangspulsinum. Við tí í huga kann sigast, at føroyskur felagssangur ikki er broyttur nevnivert síðani fyrra sangbókin kom í 2006. Einans umleið 10 sangir í *Okkara Sangbók* eru yngri enn 10-15 ár. Ein av avbjóðingunum tá ein sangbók skal savnast er at velja og vraka. Tí er einki ivast í, at tá ein nýggj *Okkara sangbók* einaferð kemur, verður ein partur av hesum 267 valdir frá. Men eftir at hava blaðað bókina ígjøgnum, so trúgvi eg, at um ein hevur *Okkara sangbók* uppi á sær til eina veitslu við felagssangi, so skula serligar umstøður gera seg galdandi, um teir ikki eru at finna í bókini.
Allir sangir eru ikki tíðarleysir, og sangrepertoire broytist altíð nakað. Tó skal havast í huga, at verður sæð burtur frá kvøðing og sálmasangi, so er føroyska sangtraditiónin ung og sangskatturin relativt avmarkaður, og tað er ein av orsøkunum til, at nógvir tíðar- og kontekstgrundaðir sangir hava verið slitsterkir í føroysku felagssangstraditiónini. Serliga tá talan er um sangir, sum sungnir verða í veitslum. Í Danmark og aðrastaðni er vanligt at siga, at sangir skula siga fólki nakað, skula teir standa seg móti tíðarinnar tonn. Men neyvan passar hetta, tá talan er um føroyskan felagssang. Vit syngja

framvegis javnan romantiskar fosturlandssangir, sangir um fiskiskap við slup og V4-sangir. Felagssangur hevur nemliga tann eginleika, at tann syngjandi verður førdur inn í eitt serligt rúm. Rím, rútma og ikki minst ímyndin av at vera partur av einum felagsskapi, er við til at skapa ein tryggleika hjá tí syngjandi, sum onkursvegna smeltar saman til eina eind, sum verður til ein sannleika. Tí kann tað kanska gera tað sama um tað er "Per fór til Havnar" ella "Sildavalsurin", sangnir frá einari farnari tíð, sum sungnir verða. Effektin er hin sama.

**Snið og uppseting**
Sangbókin byggir í nógvum lutum á bókina, sum kom í 2006. Men tað kann tykjast løgið, at bøkurnar í útsjónd skula líkjast so nógv. Tó at tað ikki er mítt borð at meta um sniðgeving, so hevði ein annar litur á permuni í hvussu er gjørt, at greiður munur sást á bókunum. Kansk eitt hugskot hevði verið at skift slitnu klicheina :"sangir og vísur til gaman og álvara" út við onkrum sum lá tættari verðuliga innihaldinum í bókini, nemliga "sangir til veitsluhald".
Eingin bólking av sangum er í bókini. Tað er annars vanligt í sangbókum, men havandi í huga, at bókin er hugsað sum ein bók at brúka í veitslulag, so kann tað helst verða stuttligt, at fólk ikki vita hvør sangur kemur á næstu síðu.
Innihaldsyvirlitið er haraftur ímóti vælútgjørt soleiðis, at sangheiti, fyrsta regla eg møguligt niðurlag kann sláast upp aftast í bókini.

**Ein guitarbók**
Áðurnevnda *Grøna sangbókin* hevði ikki einans tað endamál at útgeva eina sangbók at brúka til felagssang, men eftir sum hon, sum tann fyrsta, var útgjørd við talsetingum (becifringum) gjørdi at eisini tónleikabólkar og tónleikarar kundu fáa høvi at læra seg hesar sangir. Okkara Sangbók hevur eisini hesa ætlan: "Bókin er eisini ætlað sum ein serligur stuðul til tey, ið hava hug til at læra seg at spæla hesar sangir". Hetta ber nakrar avmarkingar í sær viðvíkjandi tónartum í bókini. Stórt sæð eru allir sanginir í tónartum, sum liggja væl at spæla á guitar: C-G-D-A-E og og tilsvarandi paralell tónartum. Hetta er mikið gott, men ber eisini í sær, at nógvir sangir eftir mínum tykki liggja ov lágt. Felagssangur skal sum tummulfingraregul ikki fara niður um "lyklarhol-C", men tað eru sangir í bókini, sum tíverri flyta seg í hesum umráði alt ørindið ígjøgnum.
Til allar sangir eru guittargrep sett á síðuna. Hetta haldi eg verða nóg so yvirdrivið. Hjá einum guittarleikara, sum situr og venur sanginar er tað uttan iva gott at hava framanfyri seg, men í brúkinum sum sangbók er hetta óneyðugt. Eitt yvirlit kundi staði aftast í bókini.

**At enda**
Tað er tað mín fatan, at sangur og felagssangur, um ikki líka nógv sum áður, enn eru týðandi partar av felagslívinum. Tí eru nýggjar sangbøkur altíð kærkomnar. *Okkara sangbók* flytir ikki føroyskan felagssang stórvegis og hevur tað helst ikki sum mál heldur. Í bókini eru teir sangir, sum verða sungnir til veitslur kring landið. Sangur er ikki bara felagssangur og bókin er tí eisini eitt kærkomið íkast til akkortfylgispæl og ikki minst hjá tónleikabólkum kring landið.
Teir 267 sanginar munna tey flestu í Føroyum bera kenslu á, og tí er heitið, *Okkara sangbók*, á góðari leið.